VIÐMERKINGAR

# Tað óvæntaða valúrslitið

**EFTIRMETING: Sambandsflokkurin stóð til at vinna stórsigur, men tapti stórt. Tjóðveldisflokkurin kundi vænta sær eitt skrædl, men endaði sum størsti flokkur á tingi. Løgtingsvalið hesaferð vísti, at onki er avgjørt, fyrr enn síðstu orðini eru søgd í einum valstríði. Tað vísti eisini, at veljararnir hugsa seg um, tá flokkar fara at seta teimum retoriskar spurningar, og at teir revsa tey, sum ikki duga at greiða frá sínum politikki**

**Uni Arge**



Teir fýra samgongufloккarnir mundu óra ilt, tá Anfinn Kallsberg orsakað vantandi stuðli til sín sjálvs skrivaði út nýval 5. desember í fjør. Fólkaflokkurin var við einum skerdum løgmansevni særdur. Tjóðveldisflokkurin kundi vænta sær ein lúsing fyri at hava verið við til at slitið fullveldissamgonguna. Sjálvstýrisflokkurin riðaði á eggini, og Miðflokkurin kundi heldur ikki kenna seg tryggan.

Seks vikur seinni vóru somu flokkar gingnir fram úr 17 upp í 18 tinglimir. Beint ímóti øllum spádómum og veljarakanningum høvdu teir styrkt um sína støðu, og Sambandsflokkurin, sum ætlaði sær at vinna stórsigur á valinum, var gingin aftur og hevði mist ein tinglim. Tað var ein sensatión. Neyvan nakrantíð í nýggjari politiskari søgu hevur úrslitið av einum løgtingsvali verið so óvæntað.

Samanbera vit valúrslitið við, hvat spádómarnir søgdu, má sigast, at Tjóðveldisflokkurin vann, hóast hann gekk aftur í prosentum. At varðveita allar átta tingsessirnar eftir seks baldrut ár í Tinganesi er væl klárað. Ikki ein einasti av tinglimunum hjá Tjóðveldisflokkinum varð eykavaldur. Øll komu inn sum umdømisvald. Tað vísir, at flokkurin er á lívi aðrastaðni enn bara í Suðurstreymi.

Javnaðarflokkurin gekk fram í prosentum, men ikki tingmannatali. Hann fekk eitt gott val. Appilsinir við nógvum C-vitaminum fingu í valstríðnum Javnaðarflokkin at virka leskiligan og positivan. Tað var tiltrongt og mundi hjálpa. Flokkurin kundi kanska fingið meira burtur av tí, sum Sambandsflokkurin misti. Men Javnaðarflokkurin skoraði so fleiri atkvøður enn seinast, og tað var ikki minst Jóannesi Eidesgaard fyri at takka. Hann upptraðkaði sum ein støðufastur leiðari alt valstríðið.

**Løgdu ongantíð um**

Sambandsflokkurin hevði frá byrjan tann trupulleikan, at hann hevði onki veruligt boð upp á framtíðina. Ungu leyvurnar í flokkinum siga, at trupulleikin var, at forkvinnan dugdi ikki at bera boðskapin fram. Kanska var tað høvuðstrupulleikin. Men kanska ein annar trupulleiki var, at allur Sambandsflokkurin, sum hann var, legði seg at bíða eftir, at atkvøðurnar skuldu fossa inn í flokkin og gloymdi at bera fram sín politikk.

Størsta mistakið hjá Sambandsflokkinum var loyniligi skattalættin. Eftir valfundin millum floksformenninar á Læraraskúlanum tvær vikur fyri valið skuldi Sambandsflokkurin beinanvegin havt lagt valstríðið hjá sær um. Longu sama kvøld gjørdu fólk gjøldur burturúr, at innihaldið í skattauppskotinum var loyniligt, og áhoyrararnir vóru á einum máli um, at Lisbeth L. Petersen skuldi vera fegin um, at loftmiðlarnir ikki sendu frá fundinum.

Men Sambandsflokkurin lærdi ikki av mistakinum á Læraraskúlanum. Hann lærdi heldur ikki av, at Dimmalætting í oddagrein fanst at avrikinum hetta kvøldið. So flokkurin helt fram í sama spori. Forkvinnan tosaði í sjónvarpinum um eitt skattauppskot, sum hon nóg illa skilti sjálv. Hon visti ikki, at orðið sjálvbjargni stóð í stevnuskránni. Hon visti ikki, hvat skrásett parlag var. Har vantaði hegni til at sannføra og greiða frá.

**Stór kanning av leið**

Eftir valið hava summi víst á, at fleiri veljarakanningar raktu langt við síðuna av. Staðfestast kann, at tann stóra kanningin hjá Fynd, sum gav Sambandsflokkinum 10 mans og Tjóðveldisflokkinum 6, fór so langt av leið, sum hon kundi, samanborið við sjálvt valúrslitið. Men tað kann væl vera, at hon gav eina rætta mynd av tí, sum veljararnir vildu, júst tá hon varð gjørd.

Millum mong tóktist leingi at vera ein brennandi hugur til at revsa ósamdu samgonguna við at velja Sambandsflokkin ella Javnaðarflokkin. Soleiðis var prátið ið hvussu er. Tjóðveldisflokkurin royndi at greiða frá, hví málið um Anfinn Kallsberg var nóg góð orsøk til at uppløysa fullveldissamgonguna. Men flokkurin var kroystur, tí líkamikið hvat hann segði, vístu kanningarnar, at Sambandið skuldi vinna og Tjóðveldið tapa stórt.

Tvær orsøkir vóru til, at hetta ikki hendi kortini. Onnur var, at Sambandsflokkurin kom illa frá valstríðnum. Hin var, at Tjóðveldisflokkurin bað fólk hugsa. Svart samband ella fræls framtíð? Tóm vallyfti ella sosial frambrot? Svarið nú, hvat tit vilja hava, segði flokkurin mestsum argandi. Hjá fleiri, sum ætlaðu at vraka flokkin, mundi øðin so líðandi leggja seg. Ikki minst síðstu dagarnar, tá Høgni Hoydal trygt bar flokkin í gjøgnum stóru sendingarnar í loftmiðlunum.

Fólkaflokkurin stóð seg eisini væl. Tað plagar hann, tá harðast leikar á. Í Fólkaflokkinum eru nógvir yvirlivarar, og í einum hørðum valstríði eru teir allir ein sterk eind. Fleiri enn 800 norðoyingar bóðu journalistiskar rithøvundar og tjóðveldisfólk floyta og krýndu Anfinn Kallsberg til kong í Norðoyggjum. Sleppur Anfinn Kallsberg ikki at verða løgmaður, kann hann ið hvussu er vera errin av uppreisnini.

Spenningurin í Fólkaflokkinum í Suðurstreymi var stórur. Poul Michelsen ætlaði at koppa annaðhvørt Óla Breckmann ella Bjarna Djurholm. Tað eydnaðist honum ikki. Kappingin millum teir tríggjar mundi geva Bjarna Djurholm ta stóru framgongd, ið hann fekk. Óli Breckmann lendi mitt ímillum sum eykavaldur. Í Vágum helt Jørgen Niclasen skansan. Eisini hann fekk uppreisn eftir lagnuløtuna í tinginum í fjør, tá hann mátti leggja frá sær sum landsstýrismaður.

**Teir smáu og stuttligu**

Sjálvstýrisflokkurin kom innum, hóast fleiri kanningar avskrivaðu hann, og fer nú væntandi at hátíðarhalda 100 ára dagin fjálgaru megin tinggáttina. Miðflokkurin vinnur fram í føroyskum politikki. Tað var eitt bragd, at flokkurin fekk bæði Jenis av Rana og Bill Justinussen valdar á ting. Men tað var kanska ikki so óvæntað, hugsa vit um, hvussu nógv spurningarnir um fosturtøku og samkynd vórðu umrøddir í valstríðnum. Miðflokkurin fekk løn fyri at hava greiða støðu til hesar spurnningar.

Tann stuttligasti í valstríðnum var Jóhan í Kollafirði. Men boðskapur hansara var eisini álvarsamur. Viðhvørt virkaði tað, sum Jóhan bardist fyri teimum, sum kenna seg øðrvísi í sandkassanum, og ímóti føroyskari vanahugsan. Velja tit tað, tit altíð hava valt, fáa tit tað, tit altíð hava fingið. Kendi nakar seg raktan? Hann var eisini stinnur í Freud, Kierkegaard og Sokrates. Tað gjørdi hann áhugaverdan. Vónandi skapti hetta fríska lotið móta, so valevnir í framtíðini fara at leita sær upp í heimspekiligar hæddir eftir íblástri í staðin fyri bara at tosa um tunlar og skatt.

Samanumtikið vísti valið, at ongin, sum stillar upp, skal kenna seg vísan í nøkrum. Heldur ikki flokkar ella valevni, sum verða spádd at skora flestar atkvøður. Tað svíður sjálvandi fast hjá sambandsfólkum, at Sambandsflokkurin skuldi missa ein tinglim og ikki vinna seg upp á einar níggju, sum útlit vóru fyri. Men niðurstøðan má vera, at veljararnir broyttu meining, tá teir ikki fingu greið boð um politikkin hjá flokkinum. Teir vóru til reiðar atkvøða fyri flokkinum, um hann bara segði tað rætta og ikki ov nógv. Men hann segði tað skeiva og ov lítið.

Nú fæst so at síggja, hvør hóast alt sessast í Tinganesi at stýra landinum.

## Tit norðuri í Havn – blakið rokniarkið av f… til

**Stutt viðmerking til ynski um heimsins besta skúla**

**Eli Hentze**
*skúlastýrislimur fyri Sands Skúla*



Barnaskúlin heima á Sandi fekk nú um dagarnar at vita, at nakrir tímar skuldu takast av tímatalvuni. Undirritaði vil gjarna hava eitt alment svar, um hví so er! Undirritaði ynskir ikki eitt akademiskt svar, ið svargevarin nóg illa skilir sjálvur. Undirritaði ynskir ikki eitt svar, ið er leitað fram úr rokniarkinum á einari ella fleiri teldum í Mentamálaráðnum norðuri í Havn. Undirritaði ynskir eitt svar, ið vanlig fólk skilja.

Anno 2004 hava børn í Sands kommunu ikki ítrótt á tímatalvuni. Rokniarkið í Mentamálaráðnum hevur givið tey boð, at fólkaheilsan, ið nógv hevur verið tosað um í seinastuni, ikki eru so neyðug fyri børn heima á Sandi.

Tað kann ikki vera rætt mitt í einum skúlaári at koma við boðum um, at nú skulu børnini ikki fáa ta undirvísing, tey høvdu fyri jól. Javnaðarflokkurin hevur tosað um matpakkar til skúlanæmingar fyri 10 milliónir kr. Jú, maturin hevur nógv at siga, men flest øll børn í Føroyum hava foreldur, ommur og abbar. Vit ynskja undirvísingartímar til okkara børn! Undanfarna samgonga hevur latið ljóðað, at undirvísingarverkið hevur fingið 10 tals milliónir fleir at ráða yvir. Undirvísingartímarnir í barnaskúlanum á Sandi eru bara fækkaðir í tali síðani einaferð tíðliga í 90´árunum.

Á Sandi fara vit at biðja foreldrini ella onnur avvarðandi at smyrja matpakkarnar hjá teirra børnum. Men vit fara at heita á tykkum, ið júst eru sett at stýa hesum landi, at geva eisini okkara børnum møguleikar at mennast á jøvnum føti við onnur í Føroyum.

Tí fari eg enn einaferð at heita á tykkum norðuri í Havn – blakið rokniarkið av f… til.

Heimsins besti skúla kann bert skapast í skúlanum!!!

# Hugleiðingar eftir valið

**Napolion Magnussen**

Fyri nøkrum árum síðani gekk sending í SVF ið nevndist »Kennir tú slagið?«.

Nú samgongusamráðingar eru í gongd, er mangt ein kann hugleiða um, tá ein sær at Javnaðarflokkurin, umframt at hava fingið Sambands- og Sjálvstýrisflokkin afturat sær, besta hugin hevur á Fólkaflokkinum.

Teir, Fólkaflokkurin, hava sitið í samgongu tey seinastu nógvu árini, og hava millum annað havt vinnu- og fiskivinnumál undir sær. Og er tað nakrastaðni, at ein sær rotinskapin skína ígjøgnum, er tað á hesum økjum.

Innan fyri vinnumál kunna vit nevna alingina á Sandavági og Sandsvág, har menn, ið hava havt umsóknir inni í áravís, ikki eingang hava fingið svar. Men so brádliga ein dag er alt »fiksað«, uttan at áður nevndu menn vistu av.

Fara vit so til fiskivinnumál er tað uppaftur lættari at finna dømir. Har hava eitt nú fleiri rættarmál peika á syndir og syndarar.

Um vit halda okkum til, at fiskiríkidømið okkara er ogn Føroya fólks, (ið vit sjálvandi aldri fáa ein Fólkafloksmann at siga, har skula jú bara tey fáa eiga alt!), er tað tí sjálvsagt, at reiðarar ikki skula kunna sita á fiskiloyvum og fiskidøgum og válka sær sum teimum lystir. Við ongum bátum, ella við bátum, ið ikki eingang hava siglingarloyvi, skula teir ikki kunna selja ogn Føroya fólks. Um teir ikki innan fyri 3-6 mánaðir hava fingið sær fiskifar ella ítøkiligar ætlanir um bygging, skal fiskiloyvið inndragast. Her kann Skipaeftirlitið verða eftirlitismyndugleiki, teir umsita jú siglingarloyvini frammanundan. Uttan siglingarloyvi, onki fiskiloyvi!

Og tað skal undir ongum umstøðum vera loyvt at selja fiskidagar, ið jú eru ogn Føroya fólks. Dagarnir skula inn í ein fiskidagabanka, ið so letur teir út aftur til teir, sum hava tørv á teimum, kanska fyri ein túr hvørjaferð. Og har haldi eg, í mótsetning til uppskot Javnaðarfloksins, at landið skal ikki »dríva buissnes«. Nei, latið til teir, ið hava brúk fyri døgum, tað skapar jú í sær sjálvum inntøkur ígjøgnum økt arbeiði.

Latið okkum fáa enda á hesum spekulantum, ið leggja óneyðugar útreiðslur á skip, og harumframt fíggja sítt luksuslív við at selja ogn Føroya fólks.

Tí er tað neyðugt í eini nýggjari samgongu, at hesin flokkur, í bert kennir sítt egna »slag«, ikki aftur fær fatur á hesum so týdningarmiklu málsøkjunum.

Kennir tú slagið? Tað geri eg!

# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Heini Johansen 70 ár



Leygardagin 17. januar fylti Heini Johansen í Vestmanna 70 ár. Heini er havnarmaður, sonur Dagmar og Herluf Johansen.

Hann lærdi til timburmann hjá pápanum, sum var timburmeistari. Síðan lærdi hann til skrivstovumann á Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna frá 1953 til 1956, tá hann fekk starv í Føroya Banka, har hann eisini fekk útbúgving sum bankamaður.

Í 1963 bleiv hann settur sum deildarleiðari hjá Føroya Banka í Vestmanna. Hetta starv røkti hann til 1994.

Síðan 1997 hevur hann arbeitt sum húsavørður hjá grannskoðaravirkinum Rasmussen & Weihe í Havn.

Heini hevur eisini sitið á Løgtingi. Í tíðarskeiðinum 1991-94 var hann eykamaður hjá Thomasi Arabo, umboðandi Javnaðarflokkin.

Heini er giftur við Finngerð f. Pætursdóttir Dam, av Tvøroyri, dóttir Ragnhild og Peter Mohr Dam. Tey eiga tveir synir, sum báðir eru maskinmeistarar, teir eru giftir og búgva í Vestmanna. Eisini eiga tey sjey ommu- og abbabørn.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin


Alix Rasmussen, veðurfrøðingur:

# Føroyska røddin frá DMI

**Vit hava nú í longri tíð hoyrt vertin á morgunsendingini hjá útvarpinum ringja til donsku veðurstøðina DMI at vita hvussu veðrið verður í vikuskiftinum. Maðurin sum sigur frá er Alix Rasmussen**



Alix Rasmussen er 51 ára gamal og klaksvíkingur, sonur Nancy, f. Mikkelsen, ættað úr Víkarbyrgi, og Steingrím Rasmussen, úr Grótinum í Klaksvík. Hann hevur fýra brøður: Jón í Grønlandi, Álvur í Havn og Páll og Steintór í Klaksvík. Steingrím er fyrrverandi maskinmestari og hevur siglt í stóru verð og við fleiri føroyskum fiskiskipum og farmaskipum.

Alix tók realprógv í Klaksvík í 1969 og studentaprógv í Hoydølum í 1972. Sum ungur var hann nakrar túrar til skips - til snellufiskiskap undir Íslandi við sluppini Sæborg og við Grunningi, til línufiskiskap við Fjallshamar og við Stellu Karina í Grønlandi og í Barentshavinum. Á landi arbeiddi hann eisini okkurt fyrifallandi: í Grótbrotinum og sum landingarmaður á Norðborg, har hann var kendur sum »grabbarin« - altíð av teimum fyrstu á krubbubotnin, tá saltfiskabátarnir vórðu landaðir, í ídnari kapping við aðrar unglingar. Ágrýtin grønur skóti hjá Vilhelm, men annars vóru flestu allar frítíðarløtur hildnar í Múla hjá ommusystrini Martinu og øðrum góðum múlafólkum!

Í 1973 fór hann til Danmarkar at lesa fysik-geofysik á universitetinum í Keypmannahavn. Hann bleiv útbúgvin veðurfrøðingur í 1981 og fekk starv á Danmarks Meteorologisk Institut, har hann hevur arbeitt síðan tá. Í fleiri ár hevur hann har m.a. arbeitt saman við okkara veðurmanni Petur Skeel - inntil Skeel í 1991 helt leiðina heim til Føroyar.

Alix er giftur við Vibeke, f. Jensen, úr Birkerød, tey búgva í Værløse og eiga tveir synir: Martin 19 ár og Thomas 11 ár.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit fyri sýndan heiður á gullbrúdleypsdegi okkara, 27. desember 2003.

Ein serlig tøkk til børnini sum gjørdu dagin ógloymandi, hátíðarligan og góðan.

Somuleiðis takka vit familju, vinum og kenningum fyri blómur, gávur, telegram og uppringingar.

**Poul og Kristina Poulsen**
**Hvalba**

## Dagurin

**27. januar. Chrysostomos,** deyður ár 407. Jóannes æt hann, men fekk navnið Chrysostomos (gullsmiður), av tí at hann var tiltikin at prædika. Var patriarkur í Konstantinopel, men fekk so nógvar fíggindar innan fyri kirkjuliðið, at hann fleiri ferðir mátti taka til rýmingar, og á einari av ferðunum doyði hann, men varð seinni skírdur halgimenni.